ítróttur

Nr. 119 • leygardagur • 25. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Julian hevur slitið krossbandið

**Landsliðsspælarin verður lagdur undir skurð hósdagin í komandi viku, og hann verður ikki at síggja á vøllinum aftur í hesum árinum**

SKADDUR LANDSLIÐSSPÆLARI
*Jóannes Hansen*

Julian Johnsson verður ikki at síggja aftur á vøllinum í ár. Ikki sum B68 spælari og harvið heldur ikki sum landsliðsspælari.

Tá ið B68 síðsta leygardag vann 4-1 í Leirvík, varð Julian noyddur at taka seg av vøllinum, tá ið bara fimm minuttir vóru farnir. Í samanbresti við mótstøðuleikara hevði hann fingið ein løst í knæi. Í vikuni varð hann kannaður, og á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn varð hósdagin staðfest, at krossbandið í øðrum knænum er slitnað. Julian skal leggjast undir skurð hósdagin í komandi viku.

Eftir skurðviuðgerð, sum hevur við krossbandið at gera, er stóra avbjóðingin uppvenjingin. Julian hevur fingið at vita, at tað er møguleiki fyri, at hann eftir ársskiftið kann fara undir aftur vanliga fótbóltsvenjing. Næsta hálva árið fer tað at snúgva seg um grundvenjingina, sum er neyðug eftir sovorna skurðviðgerð.

Tá ið Føroyar og Írland spældu landsdyst herfyri, var Julian Johnsson, sum er 30 ára gamalur, fyri 61. ferðina á landsliðnum. Hann var fyrstu ferð á landsliðnum í 1995.

- Vit harmast um, at tað skuldi ganga soleiðis hjá Juliani, og vit vóna sjálvandi, at alt fer at laga seg, sum tað skal, tá ið hann í næstu viku fer at verða lagdur undir skurð. Julian hevur altíð verið í góðari venjing, og eg ivist onga løtu í, at hann fer at gera alt, sum tað ber honum til, fyri at koma fyri seg aftur sum fótbóltsspælari. Men í fyrstu atløgu ræður tað um hjá honum at vinna førleikan aftur, sigur Niclas Davidsen, formaður í Tofta Ítróttarfelag.

Julian hevur síðani ársskiftið verið spælandi venjari á Toftum. Talan er um tvey ára sáttmála, og Julian er sinnaður at fara undir aftur venjarayrkið so skjótt, sum tað fer at bera honum til.

B68 spælir á heimavølli í dag toppdyst ímóti FS Vágar2004. Tá fer Aksel Højgaard, sum hevur verið hjálparvenjari hjá Juliani, at standa fyri liðnum.



*Julian Johnsson verður eftir øllum at døma ikki at síggja á vøllinum aftur í ár. Seinasta vikuskifti noyddist hann skaddur av vøllinum, og nú er dómurin, at krossbandið er slitið*

### John og Anderson hjálpa til

Næstu vikurnar er nógv á skránni hjá B68. Sama dag sum Julian Johnsson skal leggjast undir skurð, skulu teir spæla finalu í kappingini um FSF steypið. Dysturin verður í Gundadali ímóti B71. 6. og 24. juli skal B68 spæla hálvfinalu í kappingini um Løgmanssteypið. Mótstøðuliðið verður ÍF.

Ætlanin hevur verið, at John Petersen skuldi koma til Toftir at spæla um eina stóra viku. Nú er hetta framskundað. John vandi fyrstu ferð á Toftum hóskvøldið, og hann verður á liðnum í dag.

Harafturat er nú greitt, at brasiliumaðurin Anderson mánadagin skal koma aftur til B68. Í fjør var Anderson toppskjútti hjá B68. Í vár var hann nakrar vikur á Toftum, áðrenn hann hálvan apríl fór avstað aftur. Nú er avrátt, at hann skal koma aftur henda vegin. Fyribils er avtala gjørd um samstarv í ein mánað.

## Dystir um vikuskiftið

**Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| 25.06 | TB-EB/S | Páll Augustinussen |
| 25.06 | VB-KÍ | Birgir Sondum |
| 26.06 | NSÍ-GÍ | Eiler Rasmussen |
| 26.06 | ÍF-B36 | Dagfinn Olsen |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | Royn-Sumba | Georg Rasmussen |
| 25.06 | B36-B71 | Jens P. Brattalíð |
| 25.06 | AB-HB | Hans F. Hansen |
| 25.06 | LÍF-GÍ | Ransin N. Djurhuus |
| 25.06 | B68-FSV04 | Petur Reinert |

**3. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 26.06 | VB-ÍF | Milan Cimburovic |
| 26.06 | NSÍ-EB/S | Rúni Gaardbo |
| 26.06 | Skála-Fram | Jón S. Gleðisheygg |
| 26.06 | HB-SÍ | Jónleif Frederiksen |
| 26.06 | KÍ-B68 | Edvard Højgaard |

**Steypakappingin kvinnur hálvfinalur**

| | | |
|---|---|---|
| 26.06 | B36-GÍ | Laurits í Króki |

**Inter-Toto**

| | |
|---|---|
| 25.06 | Tampere Utd.-Skála |

# HB kann framvegi s møta Liverpool

**Vinnur HB dystirnar móti litavisku meistarunum, verður tað eftir øllum at døma Liverpool, sum bíðar í næsta umfarinum**

LUTAKAST
*Jákup Mørk*


*Eins og fyri tveimum árum síðani skal HB spæla móti litaviska Kaunas*

Spenningurin í HB-leguni var øgiligur undan lutakastinum hjá UEFA, tá tað fríggjadagin varð drigið um, hvussu innleiðandi dystirnir í Champions League kappingini skuldu setast saman.

Einamest snúi spenningurin seg um, hvørt tað skuldi eydnast HB at fáa Liverpool sum mótstøðulið, nú verjandi meistararnir fingu ein møguleika at verja heitið, hóast laku støðuna í ensku kappingini í ár.

Men tann dreymurin brast mest sum alt fyri eitt. Liverpool var fyrsta liðið, sum varð drigið úr pottinum, og teirra mótstøðulið gjørdist TNS úr Wales.

HB fekk í sín lut litaviska Kaunas, sum teir eisini hittu fyri tveimum árum síðani. Tað ferðina vunnu litavar samanlagt 5-1, men kanska hevur HB eina eyka gularót hesaferð. Vinnarin av dystinum millum HB og Kaunas skal nevnliga spæla móti vinnaranum av Liverpool-TNS!

Eisini B36 og NSÍ vóru at finna í pottinum hjá UEFA í dag. Lutakastið til UEFA-Cup kappingini var tó ikki á skránni fyrr enn beint eftir evstamark okkara, og eydnaðist tí ikki at fáa útfallið av hesum við í dag.